

# Greinarar viðmæla at keypa Atlantic Petroleum partabrævið

**Jan Müller**

10.12.2013 - 10:05

Oljan.fo

Í dag kl. 11:00 er freistin hjá privatum íleggjarum at lata peningastovninum tekningarskjal og harvið seta pening í føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum.

Freistin hjá stórum íleggjarum er kl. 15:30

Atlantic Petroleum hevur stórar ætlanir um vøkstur, serliga í Noregi. Tí er ætlanin at útvega 150-200 mió. kr. við at bjóða út nýggj partabrøv. Í samband við børsskrásetingina og kapitalhækkingina hava tveir danskir greinarar mett um partabrævið.

Steen Albrechtsen frá danska Aktieugebrevet metir, at skrásetingin í Noregi fer at føra við sær størri uppmerksemi um partabrævið, av tí at norska íleggjaraumhvørvið hevur serkunnleika á olju-

og gassøkinum. Hann væntar, at hetta fer at síggjast aftur í eini hækking av kursinum, og mælir tísskil dønum til at keypa partabrævið.

Greiningin er endurgivin á heimasíðuni hjá viðurkenda Dansk Aktionærforening, har fleiri føroyingar eru limir.

Nordea hevur í fleiri ár ummælt partabrævið hjá Atlantic Petroleum og greinarin hjá teimum, Patrick Setterberg, metir eisini at virði á partabrævinum fer at hækka, eftir at felagið er blivið skrásett á Oslo Børs.

Eisini nógv virksemi aðrastaðni

Atlantic Petroleum er virkið í frálanda olju- og gassvinnuni í Bretlandi, Noregi, Føroyum, Írlandi og Niðurlondum. Felagið eigur lut í 40 loyvum og framleiðir í løtuni umleið 2.000 tunnur av olju um dagin úr trimum leiðum í bretska partinum av Norðsjónum.

Komandi ár fer felagið millum annað at bora á føroyska loyvi 006, Brugduni. Statoil er fyristøðufelag á hesum loyvinum, og hini feløgini í samtakinum eru ExxonMobile og OMV.Atlantic Petroleum varð stovnað í 1998 og hevur í dag 40 loyvi í 5 londum. Umframt høvuðsskrivstovuna í Tórshavn hevur felagið skrivstovu í London og Bergen og tilsamans starvast 30 fólk hjá felagnum. Eginognin 30. september 2013 var 490 mio. kr.